

# Leys størv
## í Klaksvíkar Kommunu

### Námsfrøðingar til Barnahúsið Margit

Søkt verður eftir tveimum námsfrøðingum at arbeiða 27 og 30 tíma viku at byrja 1. mai 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skulu, í seinasta lagi 31. mars 2008, sendast til

Barnahúsið Margit
Traðagøta 31
700 Klaksvík

Les meiri á margit.fo ella klaksvik.fo

### Námsfrøðingar (avloysarar) til Fjallafípuna

Søkt verður eftir námsfrøðingi, fyri námsfrøðing í barnsburðarfarloyvi, at arbeiða 35 tímar um vikuna, at byrja 5. mai 2008.

Søkt verður eftir avloysara fyri starvsfólk í farloyvi, at arbeiða 25 tímar um vikuna. Starvstíðin er frá 1. mai 2008 til 1. februar 2009.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skulu, í seinasta lagi 11. apríl 2008, sendast til

Fjallafípan
undir Brekkuenda 5
700 Klaksvík

Les meiri á klaksvik.fo

VASTI 459010

Postboks 2 | FO-700 Klaksvík | www.klaksvik.fo | Tel. 410000

# Starvslýsing

Til skrivstovu okkara í Tórshavn verður søkt eftir einum starvsfólki



Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði hjá eini kolvetnisfyritøku, íroknað uppgávur um mannagongdir og roknskap, eins og skipan av samstarvi við aðrar luttakarar í kolvetnisvinnuni.

Starvsfólkið vit hugsa um, kann vera nýútbúgvið frá hægri lærustovni og hevur ætlan at fáa eina góða byrjan á starvsleiðini.
Tó eru umsøkjarar við royndum innan skrivstovuyrki, bókhaldi ella aðrari umsiting eisini vælkomnir at søkja starvið.

Góðir møguleikar eru til fakliga menning á skrivstovu okkara og í samstarvi við aðrar greinar í StatoilHydro samtakinum.

Starvið verður sett skjótast til ber. Starvstreytir og løn o.a verður avtala gjørd um.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til John Petersen, telefon 357200 ella teldupost jopet@statoilhydro.com.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 11. apríl 2008.

Virksemið hjá StatoilHydro í Føroyum fevnir fyrst og fremst um leiting eftir kolvetni á føroyskum øki og annað arbeiði í hesum sambandi. Virksemið á føroyskum øki verður útint í tøttum samstarvi við aðrar greinar í StatoilHyrdro samtakinum.

StatoilHydro hevur virksemi í 40 londum. Felagið hevur umleið 30.000 starvsfólk. Meira fæst at vita um StatoilHydro á www.StatoilHydro.com.

Umsóknir, merktar "umsókn", verða at senda til:

**StatoilHydro**
Undir Bryggjubakka 31
Postsmoga 138
FO-110 Tórshavn

www.statoilhydro.com

StatoilHydro

SØLA

# Vekt til sølu

Við hesum verður vektin á Lambareiði lýst til sølu.

Vektin hevur verið nýtt til at viga bilar við tilfari úr grótbrotinum á Hústoft.
Áhugaðir keyparar skulu boða Landsverki skrivliga frá í seinasta lagi 1. apríl 2008, kl. 14.00.

Eftir hetta verður ástaðarfundur, har nærri avtala verður gjørd um treytir.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*

# AÐALFUNDUR

Aðalfundur felagsins verður
**týsdagin 22. apríl 2008 kl. 10.00**
í Pállsstovu, Mykinesgøta 7, Tórshavn.

Skrá sambært lógum felagsins.

Forkvinnu-/formansval er.

Uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, skulu vera okkum skrivliga í hendi seinasta lagi **25. mars 2008.**

Byrjað verður við morgunmati kl. 9.30.

**Almanna-og heilsurøktarafelagið**

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!